


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 18 - 04 - 2013

# Føroyskar og grønlendskar fyritøkur møttust í Nuuk

Á vinnuráðstevnuni í Nuuk høvdu føroysku fyritøkurnar í gjár høvið at hitta grønlendskar fyritøkur í beinleiðis práti. Fyrraparturin varð skipaður soleiðis, at føroyskar fyritøkur høvdu smáar framløgur um sítt virksemi, og kunnað varð eisini um fíggjarmarknaðin í Grønlandi. Seinnapartin varð so skipað fyri sokallaðum face-to-face fundum í mentanarhúsinum Katuaq. Fundirnir vórðu avtalaðir, áðrenn farið varð úr Føroyum, og hvør fundur varð 20 minuttir, so høvið var hjá føroysku fyritøkunum at fáa ein breiðan kunnleika til, hvørjar fyritøkur eru á grønlendska marknaðinum, og hvørjar eru viðkomandi fyri føroyskar fyritøkur. Í morgun eru fyriskipaðar vitjanir á fyritøkunum Arctic Supply Base, Nuuk Transport og í nýbygdu handilsstøðini Pissifik. Føroyska ferðaliðið kemur aftur til Føroya í morgin, fríggjadagin skrivar Vinnuhúsið á síni heimasíðu. Lesið eisini samrøðu seinni í dag á oljan.fo við miðviðingin Jóannes Niclassen, sum seinastu 9 árini hevur arbeitt fyri MT Højgaard í Grønlandi. Myndir: Esther Dahl, Vinnuhúsið